LM-077/2023

Fylgiskjal 3

# FFG – Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 7. februar 2024

fmr@fmr.fo

## Hoyringsvar til uppskot til broytingar í Skattalógini v.m. – Mál.nr. 22/19215

Víst verður til teldupost tykkara 23. januar 2024 við uppskoti til broytingar í Skattalógini (SL).

Nevndin í Felagnum Føroyskir Grannskoðarar (FFG) hevur gjøgnumgingið uppskotið til broytingar í Skattalógini og tekur nevndin yvirskipað undir við, at dagføra skattalógina v.m. Tó hevur FFG hesar ítøkiligu viðmerkingar og tilmælir til broytingar til lógaruppskotið:

1. Broytingar nr. 8 og nr. 9 í uppskotinum viðføra, at øll útlendsk feløg, sum hava føst rakstrarstøð í Føroyum, og har konsolideraði umsetningurin hjá samtakinum er minst 5,6 mia.kr. fyri viðkomandi inntøkuár, skulu senda land fyri land frágreiðing til TAKS. Hetta vil vera galdandi so leingi sum Føroyar ikki hava avtalu um sjálvvirkandi umbýti av land fyri land frágreiðingum.

   Hetta vil eisini vera galdandi uttan mun til hvussu stórt ella lítið virksemi er í Føroyum. Í hesum sambandi kann vera upplýst, at onkrar altjóða fyritøkur, við konsolideraðum umsetningi omanfyri 5,6 mia.kr., eisini hava virksemi í Føroyum, sum í onkrum føri er avmarkað til eitt ella tvey starvsfólk og brutto umsetning uppá 1-5 mió.kr. árliga. Harumframt eru eisini útlendskar fyritøkur, sum hava tíðaravmarkaðan fast rakstrarstað í Føroyum í sambandi við byggiverkætlanir, vanliga í eitt tíðarskeið uppá 2-3 ár.

   Hinvegin kunnu finnast altjóða fyritøkur, sum hava konsolideraðan umsetning undir 5,6 miá.kr., men sum hava føst rakstrarstøð ella dótturfeløg í Føroyum, har lð 100-tals mió.kr. kunnu fara umvegis Føroyar í umsetningi, uttan at krav er um at lata land fyri land frágreiðing til TAKS.

   Tað tykist verða ein ávís andsøgn í hesum reglum.

   Spurningurin er tí, um tað ikki átti at verðið innset eitt minsta mark fyri vinnuligum virksemi í Føroyum, áðrenn altjóða fyritøka verður kravd at innsenda land fyri land frágreiðing til TAKS, t.d. 25, 50 ella 100 mió.kr. í árligum umsetningi frá føroyskum virksemi, ella annað hóskandi virði í hesum sambandi.

2. Broyting nr. 10, felagið hevur áður ført fram í hoyringarsvørum og víst á tørvin á EINARI felags almennari skrá fyri allar vinnufyritøkur fyri at lætta um umsitingarliga hjá vinnuni.

3. Broyting nr. 11, mælt verður til at strika broytingina og halda fast við verandi áseting í SL § 119,2,1 at tey "sum reka vinnu" hava skyldu at leggja fyri TAKS *"roknskapartilfar sítt við fylgiskjølum og annars øll skjøl til sannan av álíkningini"*. Í viðmerkingunum til broytingina verður upplýst, at verandi áseting higartil ikki hevur givið TAKS trupulleikar.

4. Broyting nr. 13, grein 120 q í SL er viðvíkjandi peningastovnum, er tað tí ein skrivivilla at tað stendur "Persónur ella feløg o.o" og ikki "Persónur ella peningastovnar o.o."?

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við FFG.

Vinarlig heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| Olaf Frits Joensen<br>formaður | Fróði Sivertsen<br>næstformaður | Jóhannes Færø<br>peningarøkil | Alvi S. S. Nielsen<br>skrivari |